NÁÐIVEKING

Ein bók sum má lesast
Boðskapurin broytir fólk, kirkjur og samkomur




Bókin er til sølu í bókahandlum kring landið.
Hon kostar einans 145 kr og er 310 síður.

Fæst eisini á www.logos.fo
Handlar kunnu bíleggja frá sol-ja@mail.dk

Sólja


# Enn eitt ævintýr frá Bókadeildini

**Bókadeildin gevur nú út seinasta bind av tríverkinum Myrkursins frumevni. Bókin eitur Ravkikarin og er ein endalig uppgerð í einum kosmiskum stríði, har tey bæði børnini Lyra og Will eru høvuðspersónar**

## RAVKIKARIN

Fyrsta og onnur bókin Norðlýsi og Tann tvíeggjaði knívurin komu út í 2004. Í hesi triðju og seinastu bókini í røðini um Lyra og Will fer lesarin við børnunum líka niður í helheim og uppaftur. Lyra er til reiðar at ofra seg sjálva og daimonin fyri koma besta vini sínum til hjálpar og bøta um nakað, hon heldur er hennara skuld. Í bókini letur hugtakið ónt og gott upp fyri tvítýddari tulking, har rithøvundurin Philip Pullman letur tað upp í hendurnar á lesaranum at tulka tað, hann lesur.

Fyrri ár fekk Pullman bókavirðislønina Litteraturpriset till Astrid Lindgrens minne. Grundgevingin var, at hann er eitt meistarligt frásøgufólk innan fjølbroytt tekstasløg – at bøkur hansara skara framúr málsliga og hava sálarligt innlit, og at høvundurin altíð stendur undir liðini á lesaranum, setir spurnartekin við myndugleikar, boðar humanismu og kærleika og heldur fast í sini optimistisku trúgv á barnið, eisini tá ið støðan tykist vónleys.

Bøkurnar hava eisini nakað sera sterkt visuelt yvir sær, í øllum førum eru hendingarnar í tríverkinum gjørdar til leik, sum hevur verið spældur á palli í The National Theatre í London, og somuleiðis verður í løtuni gjørdur stórfilmur um Lyru Silvurtungu, gentuna sum er annar av høvuðspersónunum í verkinum.

Hjalmar P. Petersen hevur týtt Ravkikarin til føroyskt.

**ave**





stanley samuelsen

**Nýggj fløga "Sól og Regn" er í handlunum.**
Konsertir:
Mikudagin 14. desember kl. 20.00 í Miðlahúsinum í Vágsbotni
Hósdagin 15. desember kl. 20.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
Fríggjadagin 16. desember kl. 20.30 í Fjørukrónni í Vestmanna

Stuðlað av Sansir, SPEKT og Kall



Pipar & Salt




Týsdagin kemur DVD út við
Pipari & Salt

Á DVD'ini eru

Pipar & Salt 2005 – eitt show
Nýggjár við Pipar & Salt
Eitt jólaævintýr

Ein ring jólagáva.
Jólini verða ov stuttlig.